# ELLA EN BLOC ?

felagið, og tað ljóðar eitt sindur órationelt í mínum oyrum. Hetta sigi eg ikki, tí at skeggið situr so nær høkuni, men tí at hetta er snúðningsásin ímillum Føroyar og útlond, og soleiðis sum hon nú er skipað, er alt uppá føroysk premissir. Føroyar eru miðdepilin í konseptinum. Táið tað ikki er víst, at ein útlendskur investorur vildi skipað tað á sama hátt, til mesta gagnið fyri føroysk áhugamál, er tað kanska ikki so heppið at føroyingar sleppa sær av við meirilutan í júst hesum felagnum. Ikki í bráðskundi í hvussu er.

Ímeðan íslendingar hava selt út av statsognunum, hava minkað um statsskuldina, hava minkað um inntøkutørvin hjá statinum, harav hava megnað at hildið skattatrýstinum niðri og sum úrslit av øllum hesum hava hildið skansanum í kappingarførinum hava vit sitið á gullinum, latið løn-arvøksturin eksploderað, serliga frá 99 og fram til ídag, við almennum gávumildni sum lokomotivi, við millum 4-5 prosentstigum um ári, við ongum botni í nakrari virðisøking, og sita nú eftir við skuldini, almennu ognunum, ongum kappingarføri í basisvinnunum og nú aftur einum vaksandi undirskotið í heimastýrissins finansum. Ringrásin er komin samanaftur, blokkurin er aftur álitið í einum vinnuliga og búskaparliga uppsteðgaðum samfelag. Hvørjum bíða vit eftir?

Sjálvandi kann tað vera ein ávísur stuttleiki hjá politikkarunum at skifta orð um hesa petitessuna, um Meinhard á Fiskavirking skal seljast í salamiflísum ella en bloc, men hví tekur ongin eina avgerð? Hugsi, at tey sum virka í hesi fyritøkuni munna vera so deyðatroytt av skiftandi politiskum signalum, m.a. tá ið tey av tingsins røðarapalli fáa at vita, at tey eru vinnuliga menningartarnað, at allur fiskurin fer óvirkaður av landinum og so fordont, at tey gleða seg til løtuna táið fyritøkan verður seld, og fær ein eigara, sum hugsar um fyritøkuna og hennara framtíð heldur enn hesar politisku akrobatarnar, sum ganga íkring og halda seg eiga hana og brúka hana sum fótatraðk tá ið onki annað er fyri hendurnar at keglast um. Og í allari kákanini í seinastuni, um pakkan hjá Kalsø, hvussu ber tað nú til, at føroyingar ongantíð hoyra um allar bummtúrarnar, táið skipini avreiða og selja uttanlands? Ímeðan føroysku virkini eru standandi skotskivur í skotríðunum táið upsaprísurin er í botni? Eisini á heimsmarknaðinum?

Sjálvt um landsstýrismaðurin í vinnumálum ikki evnaði at geva eitt íkast til hetta tjakið, so er tað avgerandi neyðugt, at tað heldur fram. Finnbogi eigur tøkk fyri at hann tók drunnin, og lat meg endurtaka, at eg eri samdur við honum í, at felagið sum hann umrøddi í klummuni leygardagin, nevniliga Føroya Fiskavirking, eigur at vera selt sum tað felagið tað er ídag - í einum. Hvat teir nýggju eigararnir síðani velja at gera við fyritøkuna, tað er teirra mál. Annars liggur søluheimildin hjá nevndini í Framtaksgrunninum, sum mátti havt okkurt annað at tikið sær fyri, enn at verið partaeigari í føroyskari flakavinnu. Megnar ongin annar føroyingur/ar tað, so sær illani út fyri framsókn í øðrum og nýggjari vinnum. So sær illani út fyri framhaldandi lívi í oyggjunum yvirhøvur.

Tað ræður nú um, at seta skjøtil á, fara til verka, broyta bygnaðir, taka fordingar niður og seta nýggjar konstruktiónir upp, men tað krevst sjálvandi at landsstýrið hevur ein vinnupolitikk, og hann hevur verið ringur at fingið eyguni á, í hvussu er síðani august mánaða árið 2000.





*Fýra trolarar við nógvum upsa løgdu veiðina upp í Vestmanna í síðstu viku*

# Fýra trolarar landaðu í Vestmanna

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fýra trolarar landaðu í Vestmanna í síðstu viku, men væntandi er ikki, at nøkur landing verður hesa vikuna.

Skipini, sum plaga at leggja veiðina upp til virkið hjá Føroya Fiskavirking, royna nú eftir hvítum fiski á Íslandsrygginum.

Í Vestmanna vænta tey tó, at tey fara at keypa annan upsa, sum verður á marknaðinum í vikuni, og hesin kemur so vestur í bili.

- Vit hava nóg mikið av fiski inni til dagvaktina í dag og kvøldvaktina, sum byrjar seinnapartin, søgdu tey í Vestmanna í gjár.

Nógvur upsi

Skipini, sum landaðu í Vestmanna í síðstu viku, vóru Vestmenningur og Fram, sum høvdu út við 300.000 pund tilsamans, Vesturbúgvin hevði stívliga 170.000 pund, og Grønanes hevði stívliga 130.000 pund.

Eysturbúgvin, sum partrolar saman við Vesturbúgvanum, landaði á Sandi og Grønanes, sum partrolarar saman við Vesturtúgvuni, landaði í Saltangará.

# Grunningur til Klaksvíkar

**Brøðurnir, sum frammanundan eiga Polarstjørnuna og Helenu, hava nú keypt Grunning fyri at fáa fiskidagarnar, sum skipið eigur**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið, Grunningur, sum eldur herfyri kom í, er nú seldur til Klaksvíkar.

Tað eru brøðurnir, Guttormur og Per Simonsen, sum hava keypt skipið. Teir hava frammanundan skipini, Polarstjørnuna og Helenu.

Sum skilst, hava brøðurnir keypt Grunning fyri at fáa fiskidagarnar, sum skipið eigur.

Ætlanin er at taka tað úr skipinum, sum er nýtiligt eftir eldsbrunan. Síðan verður Grunningur helst upphøgdur.

Grunningur er bygdur í Holbæk í Danmark í 1946, og hann er bygdur úr eik.

Áðrenn Kári Hansen á Strondum keypti skipið fyri skjótt fleiri árum síðan, átti Sámal J. Gaardlykke í Lamba Grunning.

Kjølbro í Klaksvík átti í sínari tíð skipið eitt langt áramál.